## Skýli á Argjum ávegis

Í løtuni eru áskoðaraumstøðurnar ikki tær bestu inni í Vika á Argjum, har AB spælir sínar heimadystir. Orsøkin er, at arbeitt verður við at gera skýli, og tað er nú komið so mikið áleiðis, at farast kann undir at stoypa fundamentið ein av fyrsti døgunum. Roynt verður at fáa áskoðaraplássini klár í august mánaði, so tá verða umstøðurnar hjá fjepparunum munandi betri.



## Lutakast hjá kvinnum

Í gjárkvøldið var lutakast í 3-2 um, hvussu tey fýra liðini, sum eru eftir í steypakappingini hjá kvinnum, hittast í hálvfinalunum. Har fær 07 Vestur fyrst heimavøll ímóti oddaliðnum AB, og KÍ, sum er greipuvinnari, hevur fyrst heimavøll ímóti Víkingi. Fyrru hálvfinalurnar verða 1. juni og tær seinnu 17. juni. Steypafinalan verður 4. juli.

# AB framvegis oddalið

**Við javnleiki á heimavølli ímóti níggjufaldu meistarunum úr KÍ, er AB framvegis oddalið í bestu kvinnudeildini**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Nakað so sjáldsamt sum spenningur er í 1. deild hjá kvinnum, har AB higartil roynist væl sum avbjóðari í kappingini um oddasessin. Síðani annað umfar, tá AB vann 1-0 á KÍ norðuri í Klaksvík fyrst í apríl mánaði, hava argjakvinnur verið á odda.

Tað eru tær framvegis, nú liðini hava hitst enn eina ferð, tí tá AB og KÍ spældu inni í Vika á Argjum sunnudagin, endaði tað við javnleiki 1-1. Í tí dystinum sá tó leingi út, at KÍ-kvinnurnar skuldu fara avstað við øllum, men AB kom afturíaftur og varðveitti harvið eisini oddasessin.

KÍ var tað av liðunum, ið fekk betru byrjanina og hevði yvirvág í undanvindinum at kalla allan fyrra hálvleik. Við sínum eyðkenda spælistíli royndi sigursvanda liðið at søkja at málinum hjá AB, og eftir spæl í hálvan tíma gav tað úrslit, tá Rannvá Andreasen setti bóltin í málið eftir sending úr høgru síðu.

Leiðslan var uppiborin, og hevði hon hildið sær, hevði KÍ eisini yvirhálað AB á stigatalvuni, hóast liðini tá høvdu havt sama stigatal, tí málúrtøkan hjá klaksvíkskvinnum er útivið 20 mál betri!

### Støðan óbroytt

Men einki er liðugt, fyrr enn alt er liðugt, og tað sást eisini í hesum dystinum, har AB bæði eftir málið og serliga í seinna hálvleiki menti seg og fekk lagt størri trýst á KÍ. Fleiri vandamiklar støður íkomu eftir deyðbóltar, og tað var fleiri ferðir nær við, at útjavningin kom.

Tað var tó ikki, fyrr enn bara smáir 20 minuttir vóru eftir av dystinum, at avgerðin fall. Ikki óvæntað hendi tað eftir eina deyðbóltsstøðu, tí tá AB fekk eitt hornaspark í høgru síðu og sendi bóltin innfyri. Við aftaru stong var Elin Kathrina Thomsen rímiliga leys og skallaði bóltin í málið.

Eftir hetta royndi KÍ at sleppa innaftur í dystin fyri at fáa avgerandi málið, men hóast onkur møguleiki var, eydnaðist tað ikki, og tískil gjørdi javnleiksúrslitið, at støðan framvegis er óbroytt hjá kvinnunum, so AB enn er trý stig framman fyri KÍ.



*Rannvá Andreasen úr KÍ søkir her at AB-málinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Víkingur á bronsuplássi

**Við sigri á Skála er Víkingur framvegis á triðja plássi, og EB/Streymur fekk ikki vunnið seg úr botninum, men fekk javnt ímóti B68/NSÍ**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Kappingin hjá kvinnunum koyrir líkasum í trimum, har AB og KÍ eru fremst, meðan Víkingur og Skála stríðast um bronsuplássið og botnstríðið stendur millum B68/NSÍ og EB/Streym. Sunnudagin vóru dystirnir allir millum pørini, ið sostatt fylgjast á stigatalvuni.

Á Skála vitjaði Víkingur, og har eydnaðist teimum úr Gøtu og Leirvík at vinna við einum máli, hóast Skála kanska hevði fult so nógvar kjansir. Hóast Skála var omaná í fyrra hálvleiki, eydnaðist Heidi Sevdal at leggja Víking á odda 10 minuttir fyri steðgin, tá hon fór sjálv ígjøgnum, rundaði fleiri og at enda eisini málverjan.

Dysturin javnaði seg nakað eftir steðgin, men miðskeiðis í hálvleikinum økti Heidi Sevdal við einum sera góðum langskoti úr einum 30 metrum – enntá ímóti tí vindinum, sum tá var.

Hóast aftanfyri við tveimum málum, misti Skála ikki mótið, men royndi at koma innaftur. Tað eydnaðist tó bara at fáa tað eina málið, tá eitt gott korter var eftir. Hetta málið fekk Fríðrún Danielsen, tá hon útnyttaði at málverjin og ein verjuspælari hjá Víkingi rendu saman, so bólturin lá leysur.

### Javnt botnstríð

Í dystinum millum B68/NSÍ og EB/Streym komu bara tvey mál, hóast liðini høvdu nakrar kjansir í part. Liðini eru nokk so jøvn, og at hesin dysturin endaði við javnleiki, var væl í tráð við dystargongdina.

Unn Hansen legði B68/NSÍ á odda, tá eitt korter var farið, við einum beinleiðis frísparki úr langari frástøðu, men mitt í seinna hálvleiki eydnaðist Rudi Zachariasen at javna fyri EB/Streym, tá hon átti síðsta fótin á eftir eitt nokk so væl spælt álop fram eftir miðásini.

**vodafone deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 9 | 7 | - | 1 | - | 1 | 23 | 11 | 12 | 22 |
| 2 Víkingur | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 20 | 13 | 7 | 17 |
| 3 NSÍ | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 19 | 14 | 5 | 17 |
| 4 B68 | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 15 | 15 | 0 | 14 |
| 5 EB/S | 9 | 3 | - | 4 | - | 2 | 13 | 9 | 4 | 13 |
| 6 AB | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 9 | 12 | -3 | 11 |
| 7 B36 | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 13 | 17 | -4 | 11 |
| 8 ÍF | 9 | 2 | - | 2 | - | 5 | 10 | 16 | -6 | 8 |
| 9 07 Vestur | 9 | 1 | - | 3 | - | 5 | 16 | 24 | -8 | 6 |
| 10 KÍ | 9 | 0 | - | 4 | - | 5 | 7 | 14 | -7 | 4 |

**Formbarometrið**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 6 | 5 | - | 1 | - | 0 | 18 | 8 | 10 | 16 |
| 2 B68 | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 13 | 9 | 4 | 11 |
| 3 NSÍ | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 12 | 11 | 1 | 10 |
| 4 Víkingur | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 9 | 1 | 10 |
| 5 ÍF | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 9 | 10 | -1 | 8 |
| 6 AB | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 5 | 8 | -3 | 8 |
| 7 EB/S | 6 | 1 | - | 4 | - | 1 | 8 | 7 | 1 | 7 |
| 8 07 Vestur | 6 | 1 | - | 3 | - | 2 | 12 | 12 | 0 | 6 |
| 9 KÍ | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 4 | 10 | -6 | 2 |
| 10 B36 | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 7 | 14 | -7 | 2 |

**1. deild kvinnur**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AB | 8 | 7 | - | 1 | - | 0 | 21 | 4 | 17 | 22 |
| 2 KÍ | 8 | 6 | - | 1 | - | 1 | 40 | 4 | 36 | 18 |
| 3 Víkingur | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 16 | 14 | 2 | 13 |
| 4 Skála | 8 | 3 | - | 1 | - | 4 | 14 | 21 | -7 | 10 |
| 5 NSÍ/B68 | 8 | 1 | - | 1 | - | 6 | 3 | 23 | -20 | 4 |
| 6 EB/Streymur | 8 | 0 | - | 1 | - | 7 | 4 | 31 | -27 | 1 |

### FAKTA um Vodafone-deildina

**Víkingur-B36 3-1 (0-1)**
**0-1:** Magnus Olsen, 11.
**1-1:** Sverri Jacobsen, 75.
**2-1:** Finnur Justinussen, 78.
**3-1:** Finnur Justinussen, 90.
**Dómari**: Dagfinn Olsen
**Víkingur**: Geza Turi – Sverri Jacobsen, Niclas Niclasen, Atli Gregersen, Hanus Jacobsen – Símun Louis Jacobsen (Hans Jørgen Djurhuus, 53.), Sam Jacobsen, Súni Olsen, Zoltan Bukzegi (Sølvi Vatnhamar, 73.), Magnus Skoralíð (Andreas Lava Olsen, 55.) – Finnur Justinussen
**Gult kort**: Símun Louis Jacobsen, Niclas Niclasen og Hans Jørgen Djurhuus
**B36**: Tróndur Vatnhamar – Johan Ellingsgaard, Klæmint Matras, Poul Arni Jacobsen, Bergur Midjord – Jákup á Borg (Ásbjørn V. Gunnarsson, 72.), Magnus Olsen (Janus Mortensen, 84.), Róaldur Jacobsen, Sam Malsom – Hanus Thorleifsson, Brima Koroma (Høgni Eysturoy, 79.)
**Gult kort**: Brima Koroma

**Dómarabókin**

| Feløg | GK | RK | Stig |
|---|---|---|---|
| ÍF | 23 | 2 | 29 |
| 07 Vestur | 19 | 1 | 22 |
| B68 | 19 | 1 | 22 |
| B36 | 18 | 1 | 21 |
| KÍ | 18 | 1 | 21 |
| EB/S | 14 | 2 | 20 |
| AB | 15 | 0 | 15 |
| HB | 10 | 1 | 13 |
| Víkingur | 12 | 0 | 12 |
| NSÍ | 9 | 0 | 9 |

| Spælarar | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Balazs Sinko | ÍF | 2 | 1 | 5 |
| Bartal Eliasen | ÍF | 2 | 1 | 5 |
| Sorin Anghel | EB/S | 5 | 0 | 5 |
| Poul Ennigarð | ÍF | 5 | 0 | 5 |
| Johan Petur á Stongum | 07 Vestur | 1 | 1 | 4 |
| Herbert í Lon Jacobsen | B36 | 1 | 1 | 4 |
| Egil á Bø | EB/S | 1 | 1 | 4 |
| Gudmund Nielsen | EB/S | 1 | 1 | 4 |
| Gunnar Haraldsen | 07 Vestur | 4 | 0 | 4 |
| Øssur Hansen | B68 | 4 | 0 | 4 |
| Fritleif í Lambanum | ÍF | 4 | 0 | 4 |
| Jógvan Isaksen | KÍ | 4 | 0 | 4 |
| Stefan Kalsø | KÍ | 4 | 0 | 4 |
| Niclas Niclasen | Víkingur | 4 | 0 | 4 |

Í yvirlitinum telur gult kort 1 stig. Reytt kort telur 3 stig

**Máltindurin**

| Formula-deildin | | |
|---|---|---|
| Karoly Potemkin | NSÍ | 8 |
| Fróði Benjaminsen | HB | 7 |
| Finnur Justinussen | Víkingur | 7 |
| Jens Erik Rasmussen | 07 Vestur | 6 |
| Ahmed Keita | B68 | 5 |
| Milan Kuljic | HB | 5 |
| Sam Malson | B36 | 4 |
| Levi Hanssen | EB/S | 4 |
| Andy Olsen | ÍF | 4 |
| Kristoffur Jacobsen | KÍ | 4 |
| Hans Jørgen Djurhuus | Víkingur | 4 |
| Milan Pejcic | 07 Vestur | 3 |
| Tór-Ingar Akselsen | 07 Vestur | 3 |
| Jóan Símun Edmundsson | B68 | 3 |
| Arnbjørn Hansen | EB/S | 3 |
| Rógvi Poulsen | HB | 3 |
| Hjalgrím Elttør | NSÍ | 3 |

Besti málskjúttin í Formula-deildini fær eftir kappingarárið gylta skógvin frá Thomas Dam Ítrótti